VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið.

Tórshavn, tann 27. februar 2009
Vmr J.Nr.: 200900079/

Viðgjørt: SPS

Løgtingsmál nr. 151/2007: Uppskot til løgtingslóg um at broyta ársroknskaparlógina

Uppskot

til

løgtingslóg um at broyta ársroknskaparlógina

§ 1

Í anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerene af årsregnskabsloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 4, stk. 1, nr. 1 og 2 verður orðað soleiðis:
"1) Ein fíggjarjavna upp á 7 mió. kr.,
2) ein nettoumsetning upp á 14 mió. kr. og".

2. § 7, stk. 2, nr. 1, litra a og b, verður orðað soleiðis:
"a) Ein fíggjarjavna upp á 36 mió. kr.,
b) ein nettoumsetning upp á 72 mió. kr. og".

3. § 7, stk. 2, nr. 2, litra a og b, verður orðað soleiðis:
"a) Ein fíggjarjavna upp á 143 mió. kr.,
b) ein nettoumsetning upp á 286 mió. kr. og".

4. § 9, stk. 1, nr. 2, verður orðað soleiðis:
"2) hvørt ársroknskapurin og ein møguligur samtaksroknskapur gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðu og úrslitinum hjá virkinum og samtakinum".

5. Í § 9 verður aftaná stk.1 sett:

"Stk. 2. Í leiðsluátekningini fyri virkir, sum hava virðisbrøv, ið eru upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, og fyri almenn partafeløg, skal leiðslan vátta, hvørt leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í virkinum, og, um ein samtaksroknskapur verður gjørdur, virksemi og fíggjarviðurskifti samtaksins, ársúrslit og virkisins fíggjarstøðu og fíggjarstøðan sum heild hjá teimum virkjum, sum eru umfatað av samtaksroknskapinum. Leiðslan skal eisini vátta, hvørt leiðslufrágreiðingin inniheldur eina lýsing av mest viðkomandi váðunum og óvissufaktorunum, sum virkið, og, um ein samtaksroknskapur er gjørdur, samtakið stendur fyri. Í leiðsluátekningini fyri hesi virkir, skal navn og starv í sambandi við virkið fyri hvønn einstakan av limunum í teimum ábyrgdarhavandi nevndunum og stjórnunum tilskilast.
Stk. 3. Ásetingin í stk. 2 er ikki galdandi fyri virkir, ið einans geva út skuldarinstrument, sum eru upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, hvørs áljóðandi virði pr. eind er minst 50.000 evrur, ella hvør áljóðandi virði pr. eind á útgávudegnum svarar til minst 50.000 evrur, tá skuldarinstrumentið er givið út í einum øðrum gjaldoyra enn evru."

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 60 60 • TELEFAX 35 60 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

6. Í § 9, stk. 2, ið verður til stk. 4, og § 10 a verður "ársrapporten" broytt til: "ársroknskapurin".

7. Í § 9, stk. 3, ið verður til stk. 5, og í § 14, stk. 1, 1. pkt, verður "et retvisende billede" broytt til: "eina rættvísandi frágreiðing".

8. § 11, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Ársroknskapurin og ein møguligur samtaksroknskapur skulu geva eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum hjá virkinum og samtakinum, fíggjarstøðu umframt úrslitinum. Leiðslufrágreiðingin skal innihalda eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður".

9. Í § 11, stk. 2, verður "ársrapporten" broytt til: "ársroknskapinum, ávikavist samtaksroknskapinum".

10. Í § 11, stk. 3, 1. pkt., verður eftir "stk. 1," sett: "1. pkt.,"

11. § 12, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Fyri at ársroknskapurin og samtaksroknskapurin kunnu geva eina rættvísandi mynd, og fyri at leiðslufrágreiðingin kann innihalda eina rættvísandi frágreiðing, sbr. § 11, skulu reglurnar í stk. 2 og 3 verða loknar".

12. Í § 18, stk. 1, 1. pkt., verður "jf. dog stk. 2," strikað og stk. 2 verður strikað.

14. § 38, stk. 5, verður strikað.

15. Í § 43 a, stk. 5, 1. pkt., verður "regnskabsårets« broytt til: "tann samlaða".

17. § 43 a, stk. 5, 2. og 3. pkt., verða strikað.

18. Í § 52, stk. 2, verður "årsrapporten" broytt í tveimum støðum til "ársroknskapurin".

19. Í § 53, stk. 2, nr. 1, verður aftaná litra a sett:
"b) Fyri íløguaktiv og biologisk aktiv, ið verða mátað til dagsvirði sambært § 38, skulu fyritreytirnar fyri valda roknihátttin upplýsast".
Litra b og c verða hereftir til litra c og d.

20. § 68 verður strikað.

21. § 78, stk. 1, 2. pkt., og 102, stk. 1, 2. pkt., verða orðað soleiðis:
"Tá ein ársroknskapur og ein møguligur samtaksroknskapur eru grannskoðaður, er grannskoðanarátekningin ein partur av ársfrásøgnini, sí. § 135, stk. 1, og 5".

22. Í § 83, 1. pkt., verður "Virksomheden" broytt til "Stór virkir".

23. Yvirskriftin til § 94 verður orðað soleiðis:
"Eventualskyldur v.m."

24. Aftaná § 94, áðrenn yvirskriftin "Resultatopgørelsen" verður sett:
"**§ 94 a.** Virki skal upplýsa um tiltøk, ið ikki eru innroknað í fíggjarjavnan, heríuppií nýtslu av virkjum ella virksemi til eitt serligt fíggjarligt, løgfrøðiligt, skatta- ella roknskaparligt endamál, um so er, at upplýsing hesum viðvíkjani er neyðug fyri metingina av fíggjarligu støðuni hjá virkinum.
Stk. 2. Upplýsingarnar sambært stk. 1 skulu lýsa slagið og handilsliga endamálið við tiltøkunum. Stór virkir skulu eisini upplýsa um teir váðar og fyrimunir, ið eru knýttir at arrangementunum, og fíggjarligu ávirkanina av hesum".

25. § 96, stk. 2, 2. pkt., verður orðað soleiðis:
"Upplýsingin skal útgreinast í samsýning fyri lógarkravda grannskoðan av ársroknskapinum, samsýning fyri aðrar váttanaruppgávur við trygd, samsýning fyri skattaráðgeving og samsýning fyri aðrar tænastur".

26. § 96 verður sum stk. 3, sett:
"Stk. 3. Eitt virki kann lata vera við at lata upplýsingarnar sambært stk. 2, um so er, at

roknskapurin hjá virkinum við fullari konsolidering er partur av einum samtaksroknskapi, har sum upplýsingin verður givin fyri samtakið sum heild, og samtaksroknskapurin er gjørdur av einum móðurvirki, ið hoyrir undir føroyska lóggávu ella lóggávuna í einum ES/EBS-landi".

27. § 98 a, verður orðað soleiðis:
"§ 98 a. Virkið skal geva upp miðaltalið á starvsfólkum í roknskaparárinum.
Stk. 2. Starvsfólkaútreiðslurnar hjá virkinum skulu útgreinast í lønir, eftirlønir og aðrar útreiðslur til sosiala trygging, uttan so, at hetta greitt sæst á úrslitauppgerðini.
Stk. 3. Samsvarandi upplýsingar og upphæddir, sbr. stk. 1 og 2, fyri undanfarna roknskaparár skulu nevnast".

28. § 98 c, stk. 1 og 2, verða strikað, og í staðin verður sett:
"Virkið skal upplýsa um transaktiónir við nærstandandi partar, sbr. stk. 2, um so er, at transaksjónirnar ikki eru gjørdar eftir vanligum marknaðartreytum.
Upplýsingarnar skulu umfata upphæddina fyri tílíkar transaksjónir, slagið av tilknýtinum til nærstandandi partin og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at skilja fíggjarligu støðuna hjá virkinum.
Stk. 2. Nærstandandi partar vera allýstir í samsvari við allýsingina í altjóða roknskaparstandardinum IAS 24, soleiðis sum hesin er samtyktur av Kommissiónini í samsvari við fyriskipanina hjá Evropatinginum og Ráðnum, um nýtslu av altjóða roknskaparstandardunum, og broytingum í allýsingini, sum er viðtikin av Kommissiónini í samsvari við nevndu fyriskipan. Landsstýrismaðurin kann seta reglurnar í IAS 24 viðvíkjandi allýsing av nærstandandi í gildi við kunngerð við tilvísing til heiti, nummar og dagfesting fyri, nær tær eru undirritaðar av skikkaðum myndugleikum.
Stk. 3. Tær upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1 nýtast ikki at vera latnar, um transaktiónirnar eru farnar fram ímillum virkið og eitt ella fleiri av teimum dótturvirkjum, sum virkið einsamalt eigur.
Stk. 4. Upplýsingar um einstakar transaktiónir sambært stk. 1 kunnu bólkast eftir teirra eyðkennum, uttan so, at serligir upplýsingar eru neyðugir fyri at skilja avleiðingarnar, av transaksjónum við nærstandandi pørtum, fyri fíggjarstøðuna hjá virkinum.«

Stk. 3 verður eftir hetta til stk. 5.

29. Í § 102, stk. 1, 1. pkt., dettur "jf. stk. 3" burtur.

30. Í § 102, stk. 1, 3. pkt., verður » §§ 79-101« broytt til: "§§ 79-95, § 96, stk. 1 og 2, §§ 97-101« og í 4.-6. pkt. verður »§§ 79-101« í fýra førum broytt til: »§§ 79-95, §96, stk. 1 og 2, og §§ 97-101".

31. § 102, stk. 3 og 4, verður strikað.

32. í § 107 a, stk. 1, 1. pkt., dettur "børsnoteret", burtur, og í stk. 1, 1. pkt., og stk. 1, nr. 1, litra b, verður "optaget til notering eller handel på en fondsbørs, en autoriseret markedsplads eller et tilsvarende reguleret marked" broytt til: "upptikið til handil á einum reguleraðum marknaði".

33. Aftaná § 107 a, áðrenn yvirskriftina "Særlige regler for statslige aktieselskaber", verður sum 107 b sett:
"**§ 107 b.** Eitt virki, sum hevur virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, skal hava eina frágreiðing við um virkisleiðslu, ið umfatar:

1) Upplýsingar um, hvørt virkið er umfatað av einum kodeksi fyri virkisleiðslu, og í so føri, við ávísingum til tað kodeks virkið er umfatað av.
2) Tilskilan av, hvar tað kodeks, sum er nevnt í nr.1, er atkomuligt fyri almenninginum.
3) Tilskilan av, hvørjum pørtum av kodeksinum, ið er nevnt í nr. 1, virkið ger frávik frá, og hví felagið hevur gjørt av at gera frávik frá pørtum av kodeksinum.

4) Tilskilan av orsøkunum til, at virkið ikki nýtur kodeksið, sum er nevnt í nr. 1, um so er, at virkið hevur gjørt av ikki at nýta kodeksið.
5) Tilvísingar av øðrum møguligum kodeksum fyri virkisleiðslu, sum virkið hevur gjørt av at nýta sum ískoyti til ella í staðin fyri tað kodeks, sum er nevnt í nr. 1, ella sum virkið av fríum vilja nýtur, við tilskilan av somu upplýsingum, sum í nr. 2 og 3.
6) Lýsingin av høvuðspørtunum í innaru eftirlits- og váðastýrisskipanunum í sambandi við tilgongdina viðvíkjandi latan av roknskapinum.
7) Lýsing av samansetingini á nevndunum og stjórnunum í virkinum, tess nevndir og funktiónirnar hjá hesum.

Stk. 2. Eitt virki, sum er umfatað av stk. 1, og sum einans hevur onnur virðisbrøv enn partabrøv upptikin til handil á einum reguleraðun marknaði í einum ES/EØS-landi, kann lata vera við at lata teir í stk. 1, nr. 1-5 og 7, nevndu upplýsingarnar, uttan so, at viðkomandi virki hevur partabrøv upptikin til handil í einum multilateralum handelsfaciliteti í einum ES/EØS-landi. 1. pkt. er ikki galdandi fyri almenn partafeløg.
Stk. 3. Frágreiðingin sambært stk. 1, skal latast saman við upplýsingunum í leiðslufrágreiðingini, ið eru nevndar í § 107, sí tó stk. 4.
Stk. 4. Skráseting Føroya kann gera av, at frágreiðingin sambært stk. 1 ikki skal takast við í leiðslufrágreiðingina, um leiðslufrágreiðingin hevur eina tilvísing til heimasíðuna hjá virkinum, har frágreiðingin er almannakunngjørd. Skráseting Føroya ásetur nærri reglur hesum viðvíkjandi, m.a. viðvíkjandi dagføringina av teimum upplýsingum, sum verða almannakunngjørdar á heimasíðuni.

§ 107 c. Almenn partafeløg, t.e. partafeløg, ið eru fevnd av reglum, settum sbrt. § 2 a í partafelagslógini, og sum ikki hava virðisbrøv, ið eru upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, skulu hava eina frágreiðing við um virkisleiðslu, ið umfatar:

1) Upplýsingar um, hvørt virkið nýtur eitt kodeks fyri virkisleiðslu, ella í noktandi føri, hvussu støða virkisins annars er til góða virkisleiðslu.
2) Tilskilan av, hvar tað kodeksið, sum er nevnt í nr. 1, er atkomuligt fyri almenninginum.
3) Tilskilan av, hvørjum pørtum av kodeksinum, ið er nevnt í nr. 1, virkið ger frávik frá og hví, um so er, at felagið hevur gjørt av at gera frávik frá pørtum av kodeksinum.
4) Tilvísingar av øðrum møguligum kodeksum fyri virkisleiðslu, sum virkið hevur gjørt av at nýta sum ískoyti fyri tað kodeks, sum er nevnt í nr. 1, ella sum virkið av fríum vilja nýtur, við tilskilan av somu upplýsingum, sum í nr. 2 og 3.

Stk. 2. § 107 b, stk. 1, nr. 6 og 7 eru samsvarandi galdandi fyri almenn partafeløg, sum ikki hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi. Harumframt er § 107 b, stk. 4 eisini galdandi fyri hesi virkir.
Stk. 3. Um tað almenna partafelagið er eitt dótturvirki, sum ikki hevur virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, kann virkið lata vera við at lata upplýsingarnar, sum eru nevndir í stk. 1 og stk. 2, 1. pkt.«

34. Í § 108 verður ”selskaber, hvis aktier eller obligationer er optaget til notering på en fondsbørs« broytt til »virkir, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi”.

35. Í § 109 stk. 2, 1. pkt., verður “(statslige aktieselskaber og børsnoterede virksomheder)” strikað.

36. Í § 109, stk. 2, 2. pkt., verður ”modervirksomheder, der er børsnoterede virksomheder« broytt til: “móðurfeløg, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum

reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi”.

37. § 110, stk. 1, nr. 1 og 2, verður orðað soleiðis:
“1) Ein fíggjarjavna upp á 36 mió. kr.,
2) ein nettoumsetning upp á 72 mió. kr. og.

39. § 126, stk. 1, nr. 1 og 2, verður orðað soleiðis:
“1) Upplýsingar um eventualskyldur v.m., sí §§ 64, 94 og 94 a,
2) upplýsingar um nærstandandi partar v.m., sí § 71, § 98 a og 98 c, stk. 1, 2 og 4,”

40. § 128, stk. 2, verður strikað, og ístaðin verður sett:
“Stk. 2. Ásetingarnar um leiðslufrágreiðingar, sí 99-101, eru samsvarandi galdandi, sí tó stk. 4. Um móðurfelagið er umfata av reglunum í roknskaparflokki D, eru § 107, § 107 b, stk. 1, nr. 6, og stk. 3 og 4, samsvarandi galdandi fyri samtaksroknskapin, sí tó stk. 4. Upplýsingarnir sambært § 99, stk. 1, nr. 11 nýtast ikki at verða tiknir við.
Stk. 3. Fyrstu ferð eitt móðurfelag, ið ikki hevur latið inn samtaksroknskap sambært §§ 110-112, letur inn samtaksroknskap, kann virkið uttan mun til ásetingarnar í § 101, stk. 1, nr. 2, lata vera við at vísa samanberingartøl frá undanfarnu 2-4 roknskaparárunum”.
Stk. 3. verður hereftir til stk. 4.

41. Í § 128, stk. 3, verður til stk. 4, verður sett inn sum 2. og 3. pkt.:
“Upplýsingarnir fyri móðurvirkir eftir § 107 b og fyri samtøk eftir § 107 b, stk. 1, nr. 6, skal latast samla. 1 pkt. verður nýtt samsvarandi uppá almenn partafeløg, sbr. §107 c.”

42. Yvirskriftin til part VII verður orðað soleiðis:
» **Ársfrásagnir fyri part av árinum fyri almenn partafeløg og virkir, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EØS-landi** «

43. Yvirskriftin til kapittul 16 a verður orðað soleiðis:
“Tilevnan av ársfrásagnum fyri part avárinum fyri virkir, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi”.

44. Í § 134 a, stk. 1, 1. pkt., verður “børsnoterede virksomheder, som er omfattet af regnskabsklasse D,” broytt til: “virkir, ið eru umfatað av roknskaparflokki D, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi,”.

45. § 134 a, stk. 2, verður orðað soleiðis:
“Stk. 2. Harumframt kunnu ásetingar ásetast um ársfrásagnum fyri part avárinum, sum verða gjørdar av virkjum, ið eru umfatað av roknskaparflokki A, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi”.

46. Í § 134 a, stk. 3, verður “der er optaget til notering eller handel på en fondsbørs, en autoriseret markedsplads eller tilsvarende regulerede markeder” broytt til: “sum eru upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði”.

47. § 135, stk. 1, 1. pkt., verður orðað soleiðis:
“Eitt virki, ið hevur skyldu til at gera eina ársfrásøgn sambært reglunum fyri roknskaparflokk B, C ella D, skal lata sín ársroknskap og ein møguligan samtaksroknskap til grannskoðan av einum ella fleiri grannskoðarum, sbr.tó 2. pkt.”

48. Í § 135, stk. 1, 2. pkt., verður ”årsrapporten” broytt til: “ársroknskapin”.

49. Í § 135, stk. 2 og í tveimum støðum í § 164, stk. 2, 1. pkt., verður ”årsrapporten” broytt til: “ársroknskapin”.

50. § 135, stk. 5, 1. pkt., verður strikað og í staðin verður sett:
“Grannskoðaraskyldan sambært § 1, 1 pkt., umfatar ikki leiðslufrágreiðingar og ískoytisfrágreiðingar, sum eru partar av

ársfrásøgnini, sbr.§ 2, stk. 1 og 2. Grannskoðarin skal tó geva eina váttan um, hvørt upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingina eru í samsvar við ársroknskapin og ein møguligan samtaksroknskap".

51. Í § 135, stk. 6, 2. pkt., og stk. 7, 2. pkt. verður "årsrapport" broytt til: "ársroknskap", og í stk. 6, 3. pkt. verður "årsrapporter" broytt til: "ársroknskapir".

52. § 135 a, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Einans løggildir ella skrásettir grannskoðarar kunnu grannskoða ársroknskapir og samtaksroknskapir, sum eru fevndir av grannskoðaraskylduni í § 135, stk. 1, 1. pkt., og geva eitt ummæli av leiðslufrágreiðingini, sbr. § 135, stk. 5, 2. pkt. Ásetingin í 1. pkt. verður nýtt samsvarandi um eitt virki, sum er undantikið grannskoðaraskyldu eftir § 135, stk. 1, 2. pkt., ger av at lata sín ársroknskap grannskoða, ella ger av at lata ein grannskoðara gera eitt annað arbeiði, sum hevur við sær, at hann gevur eitt úttalilsi til ársfrásøgnina".

53. § 137, stk. 1-3, verður orðað soleiðis:
»Virkir, sum ikki hava skyldu til at nýta altjóða roknskaparstandardarnar, sbr. fyriskipanina hjá Evropatinginum og Ráðnum um nýtslu av altjóða roknskaparstandardunum, sbr.skjal 4 til anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerene af årsregnskabsloven, kunnu frítt velja at gera ársroknskap ella samtaksroknskap eftir teimum nevndu standardunum, sbr. tó stk. 2".
Stk. 2. Virkir, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum regleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, og sum einans gera ársroknskap, hava tó skyldu til at nýta teir standardir, sum eru nevndir í stk. 1 í sambandi við ársroknskapin.
Stk. 3. Virkir, sum sambært stk. 1 ella 2 fylgja teimum standardum, sum eru nevndir í stk. 1, skulu fylgja øllum teimum góðkendu standardunum. Í teimum førum, har sum henda lógin regulerar somu viðurskiftir sum standardarnir, skulu virkini nýta hesar standardir, heldur enn ásetingarnar í lógini".

54. Í § 138, stk. 2, 1 pkt., verður "og 5", sett inn aftaná "135, stk. 1".

55. § 141, stk. 2, 3. pkt., verður orðað soleiðis:
"Ársroknskapir og møguligir samtaksroknskapir, sum eru við í teimum ársfrásagnum, sum er nevndar í 1. pkt., og byrjanarjavni, sum er nevndur í 2. pkt. skulu verða grannskoðað, um virkið er grannskoðaraskyldugt, sbr. § 135, stk. 1, 1. pkt."

56. Í § 141, stk. 2, 4. pkt., verður "§ 9, stk. 2," broytt til: "§ 9, stk. 4,"

57. Yvirskriftin til § 148 a verður orðað soleiðis:
"Innsending av ársfrásagnum fyri virkir, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum regleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi".

58. Í § 148 a, 1. pkt., verður "børsnoterede virksomheders halvårsrapporter« broytt til: "halvársfrásagnir fyri virkir, sum hava virðisbrøv upptikin til handil á einum regleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi,".

59. Í § 156. stk. 3, 1. pkt., verður "børsnoteret virksomhed" broytt til: "virki, sum hevur virðisbrøv upptikin til handil á einum regleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi,".

60. Í § 164, stk. 1, 1. pkt., verður "137, stk. 1 og 3," broytt til: "§ 137, stk. 2 og 3,".

61. Í § 164, stk. 1, 2. pkt., verður "§ 137, stk. 2," broytt til: "§ 137, stk. 1, ".

62. Í fylgiskjali 1, A, verður nr. 4 strikað. Nr. 5-7 verða eftir hetta til nr. 4-6.

63. Í fylgiskjali 2, 1. Skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D),

PASSIVER, EGENKAPITAL, IV. Andre reserver, verða nr. 3 og 4 strikað.
Nr. 5-7 verður eftir hetta til nr. 3-5.

64. Í fylgiskjali 2, 2. Skema for balance i beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), EGENKAPITAL, IV. Andre reserver, verða nr. 3 og 4 strikað.
Nr. 5-7 verður eftir hetta til nr. 3-5.

§ 2

Lógin fær gildi tann 1. januar 2010 og hevur virknað fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2010 ella seinni.
Stk. 2. Hóast stk. 1 kunnu virkir, tá ársfrásøgn verður gjørd nýta ásetingarnar í hesi lógini fyri roknskaparár, sum eru byrjað áðrenn 1. januar 2010, undantikið broytingarnar í § 1, nr. 21, 47-52, 54 og 55.

Viðmerkingar til lógaruppskotið

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Endamál
Lógaruppskotið hevur til endamáls at einfalda roknskaparreglurnar fyri smá og miðalstór virkir og harvið minka um administrativu byrðarnar hjá hesum virkjum, umframt at dagføra lóggávuna í samsvari við seinastu broytingarnar av 4. og 7. ES-direktivinum um ávikavist árs- og konsernroknskapir.

Uppskotið er einsljóðandi og danska lógin um broyting av ársroknskaparlógini, lov nr. 516 frá 17/06/2008, sum varð viðgjørd á Fólkatingi sum LF 100/ 2007-2008 2. samling: Forslag til Lov om ændring af årsregnskabsloven, sbr. skjal 1 og skjal 2 til lógaruppskotið.

Tá ársoknakaparøkið varð yvirtikið 1. januar 2008, var lóggávan, sum tá var í gildi, anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, verandi í gildi, sbr. § 13 í heimastýrislógini, tó soleiðis, at tær heimildir, sum eftir lógini vóru lagdar til danskar myndugleikar, við yvirtøkuni vórðu fluttar føroyskum myndugleikum. Síðani er lógin broytt einaferð við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, hareftir kærumyndugleikin, sum áðrenn yvirtøkuna var Erhvervsankenævnet, varð lagdur til Vinnukærunevndina. Galdandi ársroknskaparlóg er sostatt einsljóðandi við donsku ársroknskaparlógina, sum danska árroknskaparlógin var galdandi í Danmark, tá økið varð yvirtikið.

Í altjóða lóggávu verða sett krøv til ársroknskapirnar, og ársroknskaparøkið er eisini regulerað í ES- lóggávu samsvarandi altjóða krøvum. Á ES-stigi fer reguleringin fram við sonevndum direktivum, sum skulu útinnast við lóggávu í limalondunum.

Í vinnuni hevur tað verið eitt ynski, og tað hevur eisini verið breið politisk semja um hetta, at føroyska vinnufelagalóggávan og ársroknskaparlógin skulu fylgja altjóða reglum. Í sambandi við yvirtøkuna av vinnufelagaøkinum og ársoknskaparøkinum varð avtalað, at føroyskir og danskir myndugleikar skulu samstarva um at dagføra og halda lóggávuna við líka. Í Danmark verður ársroknskaparlógin javnan broytt fyri ein stóran part sum fylgja av ES- lóggávu, men fyri ein part eisini orsakað av øðrum umstøðum, sum ikki eru beinliðis ES- krøv.

Danska ároknskaprlógin lýkur tey krøv, sum verða sett í altjóða lóggávu, og Føroyskar fyritøkur hava leingi fylgt somu lóggávu viðvíkjandi latan av roknskapum, sum danskar fyritøkur.

Mett verður, at reglurnar í ásetingunum í donsku roknskaparlógini eru væl hóskandi eisini til føroysk viðurskifti, og at tað tí er hóskiligt at brúka danska lógagrundarlagið sum fyrimynd við teimum frávikum, sum føroysk viðurskifti gera neyðug.

Neyvari útgreining av uppskotinum eru tí at finna í omanfyri nevndu keldum, skjali 1 og 2.

Í tann mun tað verður mett neyðugt, m.a. tá tað eru frávik í ásetingunum í uppskotinum í mun til donsku ársroknskaparlógina, verða gjørdar viðmerkingar í viðmerkingunum til einstøku ásetingarnar.

Niðanfyri verður tó greitt frá høvuðsinnihaldinum í uppskotinum.

Høvuðsinnihald

ES- direktivini
Grundarlagið undir galdandi donsku og føroysku ársroknskaparlóg eru tey eurpeisku roknskapardirektivini 78/660/EØF (4. direktiv frá 25. juli 1978 um ársroknskapir) og direktiv 183/349/EØF (7. direktiv um frá 13. juni 1983 konsernroknskapir). ES- lóggávan er broytt við nýggjum direktivum, direktiv 2006/43/EØF frá 17. mai 2006 og direktiv 2006/46/EF frá 14. juni 2006.

Nevndu direktiv eru rammudirektiv, sum innihalda eina rød av krøvum til gerð av ársrapportum, sum limalondini hava skyldu at útinna í teirra lóggávu. Eisini innihalda direktivini eina rød av valmøguleikum og undantøkumøguleikum serliga fyri smáar og miðalstórar fyritøkur, sum limalondini óbundin kunnu velja at fylgja. Sostatt kunnu innanfyri karmarnar av direktivunum setast ymisk krøv til roknskapirnar, treytað av støddini á fyritøkuni og við støði í ymiska tørvinum hjá roknskaparbrúkarunum.

Millumtjóða gongdin hevur seinnu árini verið, at tað gerst alt størri munur í krøvunum, sum sett verða smáum fyritøkum, og teimum, sum sett verða størri fyritøkum, har roknskaparkrøvini til størri fyritøkur verða herd. Smáar fyritøkur eiga at hava meira liðiligar karmar.

Broytingarnar í 4. og 7. ES-direktivunum hava við sær møguleika fyri reglueinfalding av ársroknskaparlógini umframt at áleggja fyritøkunum nýggjar skyldur. Eftir broytingardirektivunum kunnu støddarmarkini hækkast fyri smáar og miðalstórar fyritøkur. Við tí fara fleri fyritøkur at verða fevndar av einum lægri roknskaparbólki, og sostatt verða fevndar av færri og einfaldari roknskaparkrøvum.

Ársroknskaparlógin
Ársroknskaparlógin er tilevnað sum ein spælikubbamyndul. Prinsippið í myndlinum er, at smáar fyritøkur skulu fylgja lutfalsliga fáum, generellum krøvum, meðan størri fyritøkur skulu fylgja fleiri og meiri nágreiniligum krøvum. Hetta fer fram á tann hátt, at flestu av roknskaparásetingunum í lógini eru býttar i roknskaparklassar A, B, C og D, sum hvør hevur sínar roknskaparásetingar. Í myndlinum er A lægsti kubbin við heilt fáum ásetingum, meðan hinir kubbarnir hava ískoytis roknskaparreglur, sum byggja omaná lægru kubbarnar. Ásetingar tættleikin verður fyrst týðandi í roknskaparklassa B, sum í veruleikanum inniheldur kjarnuna av reglunum í spælikubbamyndlinum. Fyri fyritøkur í roknskaparklassa B eru krøvini tó munandi

færri og minni kompliserað enn fyri roknskaparklassarnar C og D. Harvið sleppa hesar fyritøkurnar undan nógvum av teimum krøvum, sum moderniseringin og altjóðagerðin hava við sær.

Uppskotið

Hækking av støddarmørkunum
Tey mest týðandi uppskotini um reglueinfalding roknskaparkrøvini snúgva seg um at hækka støddarmørkini fyri smáar, miðalstórar og stórar fyritøkur. Við hesum verða fleiri smáar og miðalstórar fevndar av færri roknskaparkrøvum.

Roknskaparflokkar

		Galdandi	Uppskot
Klassi D	Fyritøkur skrásettar á virðisbrævamarknaðinum og almennar fyritøkur	Fyritøkur skrásettar á virðisbrævamarknaðinum og almennar uttan mun til stødd	Fyritøkur skrásettar á virðisbrævamarknaðinum og almennar uttan mun til stødd
Klassi C	Stórar og miðalstórar fyritøkur	Stórar fyritøkur *): Javni > 119 mió. kr. Umsetningur > 238 mió. kr. Starvsfólk > 250 Meðalstórar fyritøkur *): Javni 29-119 mió. kr. Umsetningur 58-238 mió. kr. Starvsfólk 50-250	Stórar fyritøkur *): Javni > 143 mió. kr. Umsetningur > 286 mió. kr. Starvsfólk > 250 Meðalstórar fyritøkur *): Javni 29-143 mió. kr. Umsetningur 58-286 mió. kr. Starvsfólk 50-250
Klassi B	Smáar fyritøkur	Smáar fyritøkur *) Javni 0-29 mió. kr. Umsetningur 0-58 mió. kr. Starvsfólk 0-50	Smáar fyritøkur *) Javni 0-36 mió. kr. Umsetningur 0-72 mió. kr. Starvsfólk 0-50
Klassi A	Fyritøkur við persónligari ábyrgd	Fyritøkur við persónligari ábyrgd, sum velja at gera roknskap	Fyritøkur við persónligari ábyrgd, sum velja at gera roknskap

*) 2 av 3 ásetingunum skulu vera loknar 2 fylgjandi roknskaparár fyri at koma í ávísan klassa.

Aðrir lættar:

- Sum ein avleiðing av uppskotinum um at hækka støddarmarkini fyri roknskaparflokk B, verður skotið upp, at støddarmarkini verða tillagað í lógarinnar § 4, stk. 1, fyri smá virkir fevnd av anordning nr. 1114 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (t.d. lutafeløg), sum kunnu lata vera at lata ársfrásøgn (§ 1, nr. 1 í uppskotinum).
- Broyting av grannskoðarans skyldum, t.e. at leiðslufrágreiðingin ikki longur skal grannskoðast, og konsekvenbroytingar í tí sambandinum viðvíkjandi váttanunum frá leiðsluni.

- Striking av skylduni at nýta IFRS (International Financial Reporting Standards) í ársroknskapinum fyri virkir, sum gera konsernroknskap, og hvørs virðisbrøv eru skrásett á einum reguleraðum marknaði.
- Transaktiónir millum nærstandandi. Eftir galdandi lóg skulu virkir í roknskaparflokki D upplýsa um transaktiónir millum nærstandandi, t.e. persónar ella virkir, sum hava avgerandi ella týðandi ávirkan á virkið. Uppskotið hevur við sær, at virkini ikki longur skulu upplýsa um transaktiónir, sum eru gjørdar eftir vanligum marknaðartreytum. Eftir uppskotinum skal eitt virki bert upplýsa um transaktiónir við nærstandandi, um transaktiónin ikki er gjørd eftir vanligum marknaðartreytum.

Herd krøv
Umframt nevndu møguleikar at einfalda reglurnar, hava direktivbroytingarnar við sær nýggj krøv til fyritøkurnar. Tað snýr seg um m.a. krøv viðvíkjandi fylgjandi:
1. Frágreiðing um góða virkisleiðslu fyri fyritøkur, sum eru skrásettar á virðisbrævamarknaði.
2. Upplýsing um skipanir (arrengementir), sum ikki eru tikin við í javnan.
3. Spesifikatión av samsýningini til grannskoðaran.

Ummæli
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá: Vinnuhúsinum, felagnum hjá løggildum grannskoðarum, felagnum hjá skrásettum grannskoðarum, felagnum hjá advokatum, Fíggjarmálaráðnum, Skráseting Føroya.

Tilmælini frá felagnum hjá løggildum grannskoðarum viðvíkjandi umsetingini til føroyskt mál av donsku orðunum í donsku ársroknskaparlógini “årsrapport” og “passiv” eru tkin til eftirtektar soleiðis at í uppskotinum eru tilsvarandi føroysku orðini: “ársfrásøgn” og “skyldur”. Viðmerkingarnar hjá felagnum hjá løggildum grannskoðarum viðvíkjandi ígildiskomuni eru eisni tiknir til eftirtektar, sbr. § 2 og viðmerkingarnar til ásetingina.

Viðvikjandi viðmerkingunum frá Skráseting Føroya er at viðmerkja, at tá tað í uppskotinum verður nýtt heitið “ársroknskapur”, har tað fyrr hevur staðið “årsrapport”, so kemst tað av, at eftir uppskotinum skal leiðslufrágreiðingin ikki longur grannskoðast., og at váttanin, sum grannskoðarin gevur, er ein váttan um roknskapin, ikki um alla ársfrásøngina (“årsrapporten”).
.

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

1. Fíggjarligar avleiðingar

A. Fyri landið
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið ella kommunurnar.

B. Fyri vinnuna
Uppskotið lættir um umsitingarligu byrðarnar hjá smáum ogmiðalstórum virkjum.

2. Umhvørvisavleiðingar
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

3. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

4. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

5. Sosialar avleiðingar
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar

	Fyri landið/ landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1:

Í hesum uppskotinum eru fylgjandi broytingar í lov nr. 516/2008 verða ikki tiknar við:
Nr. 1
Eftir ES- rættinum skal tað av lógini, sum útinnur ES- direktiv ganga fram hvørji direktiv lógin útinnur. Í danskari lóggávu verður tað í fótnotu til lógina víst til hvørji direktiv lógin gjøgnumførir. Broyting nr. 1 í danska lógaruppskotnum viðvíkur hesum, og er tí ikki viðkomandi í Føroyum.

Nr. 23.
Striking av § 90. Hendan ásetingin, sum viðvíkur upplýsingum í árfrásøgnini um eigindómvirði av fastari ogn eftir seinastu eigindómsmeting. Àsetingin er ikki sett í gildi í Føroyum, og hendan broytingin er tí ikki viðkomandi í Føroyum.

Til nr. 1.

Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, til § 1, nr. 2.

Til nr. 2

Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, til nr. 3.

Terminologiin í fíggjarligu lóggávuni, serliga virðisbrævahandilslógin, er enn ikki dagførd samsvarandi ES- direktivunum og lóggávuni í Danmark.

Til nr. 3 og 4
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 4.og 5

Til nr. 5 - 8
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 6 - 9.

Til nr. 9- 11
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 10- 12..

Til nr. 12.
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 13.

Til nr. 13
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 14.

Til nr. 14
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 15.

Til nr. 15
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 16.

Til nr. 16 og 17
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 17.og 18

Til nr. 18
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 19

Til nr. 19
Víst verður til skjal 2, “Betænkning over forslag til lov om ændring af årsregnskabsloven”, broytingaruppskot nr. 1 við viðmerkingum til broyting nr. 20 í lov nr. 516/2008

Til nr. 20
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 20.

Til nr. 21
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 21.

Til nr. 22
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 22.

Til nr. 23 og 24
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 24 og 25

Til nr. 25 og 26
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 26.og 27

Til nr. 27
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 28.

Til nr. 28
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 29.

Til nr. 29- 31
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 30- 32.

Til nr. 32
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 33.

Til nr. 33
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 34.

Tað verður skotið upp, at tað verða ásett nøkur nýggj upplýsingarkrøv í §§ 107 b og c viðvíkjandi frágreiðing um virkisleiðslu. Serligar reglur verða ásettar fyri statslig partafeløg, sum ikki hava virðisbrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í ES/EBS.

Í 2 a í partafelagslógini, anordning nr. 1336 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af aktieselskabsloven er um statslig partafeløg ásett:

“§ 2 a. Et aktieselskab er et statsligt aktieselskab, når den danske stat har samme forbindelse til selskabet, som et moderselskab har til et datterselskab, jf. § 2.
Stk. 2. Erhvervs- og Selskabsstyrelsen kan fastsætte regler om, at selskaber, hvori Færøernes Hjemmestyre har samme forbindelse til selskabet, som et moderselskab har til et datterselskab, skal følge reglerne for statslige aktieselskaber i denne lov og årsregnskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning, hvis særlige samfundsmæssige interesser taler herfor. Selskabet har pligt til at meddele den færøske registreringsmyndighed, når det omfattes af reglerne for statslige aktieselskaber og når det ikke længere er omfattet af disse regler”.

Ongar reglur eru ásettar um at partafeløg, har landið hevur sama tilknýti til felagið sum eitt móðurfelag til dóttirfelag, skal fylgja reglunum í partafelagslógini og ársroknsparlógini fyri statslig partafeløg. Verða tílíkar reglur ásettar, verða hesi feløg fevnd av reglunum í ársroknskaparlógini um statslig partafeløg, heruppií reglunum í uppskotinum til § 107 c um frágreiðing um virkisleiðslu

Til nr.34- 36
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 35-37.

Til nr.37
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 38.

Til nr.38
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 39
.
Til nr.39 og 40
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 40 og 41.

Til nr.41- 45

Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 42 og 46.

Til nr.46- 50
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 47- 51

Til nr.51
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 52.

Til nr.52
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 53.

Til nr.53 og 54
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 54 og 55.

Til nr.55
Víst verður til skjal 2, “Betænkning over Forslag til lov om ændring af årsregnskabsloven”, broytingaruppskot nr. 1 við viðmerkingum til broyting nr. 20 í lov nr. 516/2008

Til nr. 56- 58
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 56- 58.

Til nr.59
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 59.

Til nr. 60 og 61
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 64 og 65.

Til nr. 62
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 66

Til nr. 63 og 64
Víst verður til skjal 1, “Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser”, § 1, nr. 68 og 69

Til § 2
Eftir uppskotinum skal lógin fáa gildi fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2010 ella seinni.

Eftir stk. 2 verður møguligt, at virkini – undantikið broytingarnar viðvíkjandi skylduni hjá grannskoðaranum í sambandi við leiðslufrágreiðingina – kunnu nýta ásetingarnar í lógaruppskotinum fyri eitt roknskaparár, sum er byrjað áðrenn 1. januar 2010. Tað hevur við sær, at ásetingarnar t.d. kunnu nýtast fyri roknsdkaparár, sum renna frá 1. januar 2009 til 31. desember 2009

Skjøl:
1. Viðmerkingar til L 516/2006
2. Álit í málinum frá Fólkatingsins Erhvervsudvalg
3. L 516/ 2008
4. Føroya Arbeiðsgevarafelag
5. Felagnum hjá Løggildum Grannskoðarum
6. Skráseting Føroya.

Johan Dahl
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen